## Tilmæli til Yrkisútbúgvingarráðið frá fyribilsnevnd um at seta í verk yrkisútbúgving til byggismið
## Juni 2003

## Formæli

Á fundi í Yrkisútbúgvingarráðnum í september 2002, samtykti ráðið at seta eina fyrisbilsnevnd at viðgera eina áheitan um at seta í verk yrkisútbúgvingina bygningssmiður. Nevndin hevur seinni givið útbúgvingini heitið *byggismiður* - sí um hetta á bls. 7.

Áheitanin til ráðið kom frá Føroya Handverksmeistarafelag, sum í skrivinum m.a. sigur, at felagið saman við Tekniska skúla í Klaksvík hevur kannað møguleikan at seta á stovn hesa handverksútbúgving í Føroyum.

Tað fyrsta, sum fyribilsnevndin fór undir, var at gera eina kanning av fyritøkum í Føroyum, sum arbeiða innan hetta fakøkið - les meira um hesa á bls. 6-7.

Kanningin vísir, at meira enn helvtin av teimum, sum arbeiða á hesum økinum, hava eina útbúgving sum húsasmiðir, snikkarar o.l. Í øðrum lagi kann staðfestast, at eittans eitt starvsfólk í teimum fyritøkum, ið svaraðu spurningunum, er útbúgvin byggismiður. Í triðja lagi framgongur av kanningini, at nærum fjórði hvør als ikki hevur nakra útbúgving.

Svarið upp á hví so er, kann vera, at yrkisútbúgvingin til byggismið ikki finst herheima, og at útbúgvingin í Danmark ikki er so gomul.

Í eitt nú Danmark, hevur hetta stórt sæð verið fakøkið hjá serarbeiðarum (specialarbejdere). Hetta eru arbeiðsfólk, sum fáa eina serarbeiðaraútbúgving, t.v.s. luttaka á skeiðum innan tað serliga arbeiðsøki, tey arbeiða í. Danir hava eisini útbúgvingina, teir kalla ”brolægger”, sum er eitt aldargamalt yrki í flestu londunum í Europa. Hetta eru fólk, sum mest fáast við at leggja flísar (brosten) o.l. Seinastu árini er hendan útbúgvingin í Danmark víðkað til eisini at fevna um tað, teir kalla ”struktør”. Í fylgiskjali 1 er stutt frágreiðing um donsku útbúgvingina, har greitt er frá, at talan er um eitt fakøki, har sett verða størri og størri faklig og ástøðilig krøv.

Í Føroyum hava vit sum kunnugt hvørki serarbeiðaraútbúgvingar ella byggismiðútbúgving. Møguliga er hetta høvuðsorsøkin til, at fólk við aðrari útbúgving ella fólk við ongari útbúgving arbeiða á hesum økinum.

Fyribilsnevndin vónar, at ráðið við støði í hesi tilráðing fær teir neyðugu upplýsingarnar til at taka støðu um útbúgvingina sum *byggismiður*.

## 1. táttur: Tilevning og arbeiðssetningur

### Reglugrundarlagið:

Sambært § 22, stk. 3 í yrkisútbúgvingarlógini er ásett, at *tá ið útbúgvingar skulu fyrireikast og setast í verk, kann yrkisútbúgvingarráðið seta fyribilsnevndir*.

Uppgávan hjá einari fyribilsnevnd er at koma við tilráðing til Yrkisútbúgvingarráðið um ymisk viðurskifti i sambandi við eina *nýggja* útbúgving. Tilráðingin hjá fyribilsnevndini verður síðani nýtt í sambandi við eitt møguligt tilmæli frá Yrkisútbúgvingarráðnum til landsstýrismannin um at stovnseta nýggju útbúgvingina.

## Áheitanin um at taka málið um nýggja útbúgving upp:

Í skrivi frá Føroya Handverksmeistarafelag, dagfest 13. juni 2002, heitti felagið á Yrkisútbúgvingarráðið um at seta eina fyribilsnevnd til at fyrireika útbúgvingina *"Bygningssmiður"*.

Í skrivinum verður m.a. sagt, at *Føroya Handverskmeistarafelag hevur saman við Tekniska skúla í Klaksvík kannað møguleikan fyri at seta á stovn handverksútbúgvingina bygningssmiðir í Føroyum. Ein bygningssmiður skal hava yrkisførleika til at luttaka og avrika vanligar entreprenøruppgávur. Tekniski skúli í Klaksvík hevur havt fund við tær stóru byggifyritøkurnar í Føroyum, sum meta, at henda yrkisgrein manglar í Føroyum.*

## Málið fyri á ráðsfundi

Málið kom fyri á ráðsfundinum tann 18. september 2002, og sambært gerðabókina fyri hendan fundin er soleiðis samtykt hesum viðvíkjandi: "*Ráðið samtykti at seta eina fyribilsnevnd til at fyrireika íverksetanina av bygningssmiðútbúgvingini. Ráðið samtykti somuleiðis, at heitt verður á Føroya Handverksmeistarafelag um at velja 1 lim í fyribilsnevndina, Føroya Handverkarafelag 1 lim, teknisku skúlarnar 1 lim í felag og Mentamálaráðið 1 lim. Ráðsskrivarin er nevndarskrivari."*

Í skrivi frá ráðsfyrisitingini, dagfest 26. sept. 2002, verður heitt á omanfyri nevndu at velja limir í fyribilsnevndina. Hesir limir vórðu valdir:
Eyðfinn Lenvig vegna Føroya Handverksmeistarafelag
Poul Øregaard vegna Føroya Handverkarafelag
Jan Ellebye Andersen vegna teknisku skúlarnar
Christina Nolsøe vegna Mentamálaráðið
Petur Oluf Hansen, ráðsskrivari var skrivari í nevndini.

## Vegleiðandi arbeiðssetningur

Ráðsfyrisitingin hevði tilevnað soljóðandi leiðbeining í sambandi við arbeiðið hjá fyribilsnevndini:

Sambært galdandi ásetingum í yrkisútbúgvingarlógini, skal lærlingur í síni læru fáa
1) eina útbúgvinging, sum gevur ein beinleiðis fakligan førleika,
2) eina skiftivís verkliga upplæring á arbeiðsplássi/-plássum
og undirvísing í skúla,
3) eina útbúgvinging, sum skal kunna veita almenna og
persónliga menning. T.v.s., at hon inniheldur yrkislærugreinir,
almennar lærugreinir og vallærugreinir eins og aðrar
miðnámsútbúgvingar, og
4) eina útbúgvinging, sum so vítt til ber skal kunna geva møguleikar

til at fara undir eina framhaldsútbúgving.

Verður útbúgvingin "bygningssmiður" skipað samsvarandi nevndu málsetningum í yrkisútbúgvingarlógini, merkir hetta,
at fyritreytirnar fyri læruplássum innan nevnda øki skulu vera til staðar,
at fyritreytirnar fyri at fáa neyðuga fakliga og almenna undirvísing skulu vera til staðar,
at lokin útbúgving skal kunna geva førleika til framhaldslestur, og
at útbúgvingin, um hon skal samanberast við eina miðnámsútbúgving, í minsta lagi tekur 3 ár.

Við støði í omanfyri nevndu ásetingum og málsetningum, verður arbeiðsbólkurin biðin um geva ráðnum sína tilráðing um bygningssmiðútbúgvingina, soleiðis at lærlingurin nær

- tey fakligu málini,
- tey almennu málini,
- tey persónligu málini og
- møguleikunum fyri framhaldandi útbúgving.

## 2. táttur: Arbeiðið hjá fyribilsnevndini

Fyribilsnevndin hevur havt 4 fundir. Fyrsti fundur varð hildin 2. des. 2002 og tann seinasti tann 9. juni 2003. Tilráðingin varð handað Yrkisútbúgvingarráðnum tann 9. juni 2003.

### Spurnarkanning

Til tess at útgreina tørvin á yrkislærdum byggismiðum, lat fyribilsnevndin gera spurnarblað, sum varð sent fyritøkum, sum vóru mettar at vera viðkomandi, tá talan er um hetta arbeiðsøkið, og sum nevndin eisini metti vera fyritøkur, sum kundu væntast at fara at taka lærlingar í læru sum byggismiðir.

Spurningarnir, ið settir vóru, vóru hesir:

1) Navnið á virkinum?
2) Hvat slag av virksemi fer fram á virkinum (høvuðsvirksemið)?
3) Hvussu mong (við og uttan útbúgving) arbeiða á virkinum tilsamans (ársverk)?
4) Fer virkið at seta lærling í læru, um møguleiki verður fyri tí? Um ja, hvussu nógvar?
5) Til tess at meta um, um førleiki er fyri at upplæra lærling, verður virkið biðið um at upplýsa, hvørjar ymiskar útbúgvingar og/ella starvsroyndir starvsfólkini á virkinum hava.
6) Hvat halda tygum um tað, at lærlingar skulu kunna koma í læru sum bygningssmiðir? (Hava tygum annars aðrar viðmerkingar, ber til eisini at skriva á baksíðuna).

Spurnarbløðini vóru send 34 fyritøkurm 13 teirra svaraðu fyrispurningunum. Í svarunum frá fyritøkunum, sum sendu spurnarblaðið innaftur, framgongur:

- At tilsamans 230 fólk starvast í hesum fyritøkum, av hesum hava 127 eina útbúgving, t.v.s. 55%.
- At flestu fyritøkurnar høvdu húsasmiðir í arbeiði (tils. 50 avlærdir og 8 lærlingar umframt 6 snikkarar - íalt 64) Hetta svarar til helvtina av øllum, sum hava eina útbúgving ella uml. 28% av samlaðu starvsfólkunum.

- At onnur umleið 30 starvsfólk - svarandi til uml. 13% - sum hesar fyritøkur hava í arbeiði, hava aðra útbúgving enn tey 64 nevndu omanfyri, harav eisini eina framhaldandi útbúgving.
- At onnur umleið 30 starvsfólk - svarandi til uml. 13%, als onga útbúgving hava.
- At einans 1 starvsfólk hevur tikið útbúgving sum byggismiður (struktør) .

At av svarunum frá teimum 13 fyritøkunum til sp. 4, um virkið fer at seta lærling í læru, um møguleiki verður fyri tí, framgongur, at hesi virki fara at seta tilsamans einar 15 lærlingar í læru.

- 12 av teimum 13 virkjunum svara sera positivt upp á sp. 6 um hvat tey halda um tað, at lærlingar skulu kunna koma í læru sum bygningssmiðir. Úttalilsir sum ”sera gott”, ”hart tiltrongt” og ”framúr gott” vóru tey mest vanligu. Viðmerkjast skal, at júst hesar fyritøkurnar eru tær mest viðkomandi, tá talan er um byggismiðyrkið.

Fyribilsnevndin (skrivarin) hevði eisini samskifti við fyritøkur, sum ikki høvdu sent spurnarblaðið innaftur. Flestu samrøðurnar við hesar fyritøkur bendu á sama borð, sum innkomnu svarini.

### Kunning frá skúla o.ø.

Nevndin hevur eisini havt samskifti við skúlaleiðsluna á Tekniska skúla í Klaksvík, sum hevur útvegað nevndini tilfar um útbúgvingina, sum leiðslan m.a. hevur fingið á kunningarferð í Danmark. Leiðslan hevur eisini upplýst fyri nevndini um hølis- og útbúnaðarviðurskiftini við atlit at byggismiðútbúgvingini.

### Niðurstøða

Út fra spurnarkanningini, sum fyribilsnevndin metir vera rættuliga vegleiðandi, frá ymiskum kunningartilfari um útbúgvingina og eftir viðgerð á fundum í nevndini, kom hon til ta niðurstøðu, at brúk er fyri at fáa sett í verk eina yrkisútbúgving til byggismið.

Grundað á hesa niðurstøðu, ger fyribilsnevndin í kap. 3 eina útgreinaða tilráðing um, hvussu útbúgvingin til byggismið kann verða skipað. Í kap. 4 er gjørdur ein samandrátt av tilráðingunum, her í millum í hvønn mun, nevndin hevur rokkið málini samsvarandi arbeiðssetninginum.

## 3. táttur: Útgreinað tilmæli viðvíkjandi útbúgvingini

Sum longu nevnt, er fyribilsnevndin komin til ta niðurstøðu, at brúk er fyri yrkisútbúgvingini byggismiður. Nevndin fer tí í hesum tátti at gera sína tilráðing um, hvussu útbúgvingin kann verða skipað, hvat innihald útbúgvingin kann hava o.s.fr.

### Útbúgvingarheitið

Nevndin varð samd um at geva útbúgvingini heitið *yrkisútbúgving til byggismið*. Heitið er í mun til *bygningssmiðir* meira hóskandi og í størri samsvar við tær uppgávur, sum lærlingar og yrkislærd taka sær av. Heitið samsvarar eisini í størri mun til útbúgvingarstigini innan hetta arbeiðsøki: byggismiður - byggifrøðingur - byggiverkfrøðingur.

### Endamálið við útbúgvingini

Tann avlærdi byggismiðurin skal kunna loysa vanligar fyrikomandi entreprenøruppgávur og á einum høgum stigi sjálvstøðugt kunna fremja allar arbeiðstilgongdir innan viðkomandi sergreinaøki. Eisini skal tann avlærdi á ein framkomnan hátt og á einum forsvarligum fakligum og fíggjarligum støði kunna tilrættaleggja og fremja uppgávurnar við atliti at galdandi siðvenjum, standardum, lógum og reglum.

Endamálið við útbúgvingini skal eisini verða í samsvari við § 2 í yrkisútbúgvingarlógini: 1) at menna tann einstaka og hjálpa viðkomandi til samfelagsliga fatan, 2) at leggja grundarlag undir framtíðar yrki og framhaldandi útbúgving og 3) at nøkta tørvin hjá vinnuni, tá ið um ræður fakligan førleika og almennan kunnleika.

## Útbúgvingarskipanin

Fyribilsnevndin hevur kannað, hvussu útbúgvingin verður skipað í eitt nú Danmørk, har útbúgvingin nevnist struktørútbúgving - sí donsku frágreiðingina í fylgiskjali 1. Útbúgvingin (upplæringin) har, sum varir 3 ár og 6-11 mánaðir, er skipað sum ein skiftisútbúgving, t.v.s. skiftivís á læruplássi og skiftivís í skúla. Útbúgvingin hevur 3 breytir: verklagsbreytin, byggibreytin og brúgvabreytin. Stutt kann sigast, at verklagsbreytin fatar um tríggjar høvuðsgreinar: jørðarbeiði, kloakk- og rørleiðingar og bygningsuppgávur. Byggibreytin fatar mest um arbeiði omaná, t.v.s. gera fundamentir, seta upp forskallingar, stoypa, seta upp byggielementir o.s.fr. Brúgvabreytin fatar um álegging av flísum o.t.

Fyribilsnevndin mælir til, at nevndu breytir verða lagdar saman til 1 breyt í føroysku útbúgvingini. Mælt verður somuleiðis til, at lærutíðin verður í samsvar við húsasmiðútbúgvingina, t.v.s., at lærutíðin verður 3 ár og 9 mánaðir. Mælt verður tó til, at skúlaparturin verður eitt sindur longri, t.v.s. 55 vikur til tess at røkka neyðugu undirvísingina í sergreinunum. At mælt verður til, at breytirnar verða lagdar saman til 1 breyt, byggir á fleiri orsøkir, nevnast kann,

- at ein stórur partur (80%) av skúlaundirvísingini er tann sami í breytunum.
- At einans sergreinirnar (20%) eru ymiskar í breytunum, eru ymiskar
- at arbeiðsuppgávurnar í stóran mun eru tær somu í breytunum, og
- at arbeiðsøkið er ov smábýtt í Føroyum til at hava fleiri breytir.

Lærusáttmáli skal verða gjørdar við góðkent lærupláss áðrenn læran byrjar. Hevur lærlingur eina viðkomandi støðisútbúgving ella aðra viðkomandi skúlaútbúgving ella starvsroyndir, eigur hann at fáa frítøku í skúlaundirvísingini og møguliga at fáa lærutíðina styttað eftir galdandi reglum.

Fyribilsnevndin heldur, at tá ið talan er um nýggja útbúgving, eigur serligt fyrilit at verða tikið til drúgvar starvsroyndir innan byggismiðyrkið, herundir stytting av lærutíðini.

Útbúgvingin eigur annars at koma undir somu skipanarreglur sum aðrar yrkisútbúgvingar.

## Skúlaundirvísingin

Endamálið við skúlaundirvísíngini er at geva lærlingunum tær neyðugu almennu og serligu fyritreytirnar til at fremja uppgávurnar innan arbeiðsøki, sum útbúgvingin hevur til endamáls. Skúlaundirvísingin skal harumframt menna tann einstaka og hjálpa viðkomandi til samfelagsliga fatan og grundleggjandi førleika til framhaldandi útbúgving.

Fyribilsnevndin mælir til, at undirvísingin fevnir um evni í øllum sergreinunum umframt evni, sum eru serliga galdandi í føroyskum viðurskiftum. Talan er her um tey serligu føroysku jarðfrøðiligu viðurskiftini, so sum at hava kunnleika til boring, spreinging, steinseting og grótlaging.

Ávegis royndir í yrkislærugreinum kunnu fara fram, um yrkisnevndin samtykkir hetta. Royndir ella próvtøkur í almennum lærugreinum fara fram eftir gjøllari av landsstýrimanninum ásettum reglum.

Tað er uppgávan hjá viðkomandi yrkisnevnd at áseta í lesiætlanini fyri útbúgvingina, hvørji evni lærlingarnir skulu fáa undirvísing í. Fyribilsnevndin mælir tó til, at tær yrkislærugreinir (her í millum sergreinaevni), sum eru í báðum breytunum í donsku útbúgvingini, verða havdar í teirri føroysku útbúgvingini.

Tað er eisini uppgávan hjá viðkomandi yrkisnevnd at gera eina neyvari greining av evnunum, sum útbúgvingin skal innihalda. Yrkisnevndin samtykkir somuleiðis býtið millum yrkislærugreinir, almennar lærugreinir og sergreinir. Her skal viðmerkjast, at § 12, stk. 2 í yrkisútbúgvingarlógini tó ásetir, at yrkislærugreinirnar, herundir sergreinirnar, skulu vanliga fata um 60% av samlaðu undirvísingartíðini, almennar lærugreinir 30% og vallærugreinir 10%.

Fyribilsnevndin mælir til, at lærlingarnir fáa undirvísing í hesum almennu lærugreinunum: føroyskum, enskum støddfrøði og alisfrøði. Fyribilsnevndin hevur ikki tikið støðu til, um hesar lærugreinir skulu verða á einum gymnasialum C-stigi ella á einum lægri stigi.

Innihaldið í teimum almennu lærugreinunum er ásett av landsstýrismanninum í kunngerð, her í millum undirvísingarevni, tímatal o.l. og hvussu próvtøkur fara fram.

***Yrkisskúlin***, sum lærlingurin skal á í kravdu skúlagongdini í lærutíðini, er ein spurningur, sum fyribilsnevndin ikki er biðin um at viðgera og heldur ikki hevur viðgjørt so neyvt. Viðmerkjast skal tó, at í øðrum handverksútbúgvingum fer skúlagongdin annaðhvørt fram í føroyskum ella í donskum yrkisskúla. Fyribilsnevndin hevur kannað og fingið upplýst, at lærlingar í byggismiðútbúgvingini - eins og aðrir handverkslærlingar - kunna taka kravdu skúlagongdina í donskum yrkisskúla, men heldur nevndin tó, at tað átti at verið møguligt heldur at havt skúlagongdina í Føroyum.

Fyribilsnevndin hevur kannað eitt sindur, hvat krevst fyri at hava skúlagongdina í Føroyum. M.a. hevur nevndin verið í samband við leiðsluna á Tekniska skúla í Klaksvík hesum viðvíkjandi. Talan er um trinnandi høvuðstreytir: Lærarar, hølI og útbúnaður.

Hvat viðvíkur lærarum, so upplýsir skúlin, at føroysku skúlarnir hava sum er lærarar í almennu lærugreinunum og fleiri yrkislærugreinum. Í øðrum yrkislærugreinum metir leiðslan tað ikki fara at verða trupult at fáa lærarar.

Hvat viðvíkur høli til undirvísingina, upplýsir leiðslan á skúlanum soleiðis: *Vit meta, at allar almennu lærugreinirnar og ein partur av yrkisfrálæruni kann skipast á einum tekniskum skúla, ið hevur timbur- og snikkaraverkstað. Innan yrkislæruna annars er tørvur á einum høli til forskalling, jarnbinding og stoyping. Sjálvandi kann hetta gerast undir opnum himni, men roknast má við, at veðrið kann darva undirvísingina. Hartil er tørvur á einum planeraðum øki, har undirvísast kann í graving, tyrving, kloakering o.ø. Møguliga kann hetta skipast í samstarvi við eina entreprenør fyritøku, sum javnan hevur tilík arbeiði. Um spreinging skal verða ein partur av yrkisfrálæruni, so er neyðugt at hava atgongd til eitt fjarskotið øki, t.d. eitt grótbrot.*

Viðvíkjandi spurninginum um neyðuga útbúnaðin til byggismiðútbúgvingina, sigur leiðslan á skúlanum soleiðis: *Sum nevnt omanfyri ber til at samstarva við ein útleigara ella entreprenørfyritøku um serliga útgerð, sum er knýtt at yrkisfrálæruni. Neyðugt er at hava atgongd til m.a. hesa útgerð: rennugravara, systemforskalling, útgerð til jarnbinding, blandimaskinu, vibrator, stillads, stampara, mátitól (nivellering o.a.) umframt hondamboð til nevndu arbeiði.*

### Verkligi parturin

Endamálið við verkliga partinum er at geva lærlinginum almennan og fakligan førleika fyri at kunna fremja uppgávurnar sum byggismiður, og at geva lærlinginum eina praktiska og ástøðiliga vitan, sum ger hann føran at taka á seg sjálvstøðugar uppgávur.

Upplæringin í verkliga partinum skal fara fram á einum av viðkomandi yrkisnevnd góðkendum læruplássi. Fyribilsnevndin hevur ta fatan, at ikki allar føroyskar fyritøkur fevna um eitt nóg breitt upplæringarøki, og tí mælir nevndin til, at um so er, at eitt lærupláss ikki kann geva upplæring í øllum teimum evnum, sum reglurnar fyri útbúgvingina áseta, eigur treytin fyri at kunna taka lærling í læru at vera, at læruplássið ger avtalu við annað lærupláss (útisetavirki), sum so kann geva lærlinginum upplæring í teimum uppgávum, sum læruplássið annars ikki megnar.

Læruplássið eigur at skipa uppgávurnar soleiðis, at lærlingurin fær eina stigvísa upplæring, sum við endan av lærutíðini gevur honum tann neyðuga førleikan at virka sum avlærdur byggismiður.

Tað er uppgávan hjá yrkisnevdini at áseta í lesiætlanunum fyri útbúgvingina eina neyvari greining av evnunum, sum lærlingar skulu fáa upplæring í.

### Sveinaroynd

Sveinaroynd verður hildin erftir reglum, sum verða ásettar í útbúgvingarkunngerðini fyri byggismiðútbúgvingina. Sveinabræv verður útskrivað eftir galdandi reglum, tá ið sveinaroyndin er staðin og skúlaváttan og starvsváttan er latin yrkisnevndafyrisitingini.

### Møguleikin fyri framhaldandi útbúgving

Fyribilsnevndin leggur dent á, at yrkislærdur byggismiður skal hava møguleika at útbúgva seg víðari eins og aðrir avlærdir lærlingar. Nevndin hevur kannað, hvørjar treytirnar eru fyri upptøku á framhaldsútbúgvingum og er komin til ta niðurstøðu, at avlærdir byggismiðir lúka upptøkutreytirnar til framhaldandi útbúgving til eitt nú bygningskonstruktør.

## 4. táttur: Samandráttur og niðurstøða

Í arbeiðssetninginum verður biðið um, at fyrisbilsnevndin viðger ávís viðurskifti. Nevndin er av teirri áskoðan, at hesi viðurskifti eru tikin við í hesum tilmæli, og hevur nevndin somuleiðis gjørt sær sínar tankar og tilráðingar hesum viðvíkjandi. Í hesum samandrátti skulu stutt nevnast tær niðurstøður, nevndin er komin til:

*Fyritreytirnar fyri læruplássum innan nevnda øki skulu vera til staðar.*

Her verður víst til ta kanning, sum nevndin hevur gjørt millum virkir, sum kunnu hugsast at fara at taka lærlingar í læru. Sambært niðurstøðuna á bls. 6 kann staðfestast, at tørvur er á at útbúgva fólk til byggismiðyrkið. Somuleiðis metir fyribilsnevndin, at tær fyritøkur, sum samband hevur verið við, lúka fyritreytirnar at taka lærlingar. Sum umrøtt á bls. 10, eiga fyritøkur eisini - um tað er neyðugt, at gera avtalu við útisetavirki.

*Fyritreytirnar fyri at fáa neyðuga fakliga og almenna undirvísing skulu vera til staðar.*
Nevndin hevur fingið upplýst, at til ber hjá lærlingum, sum taka byggismiðútbúgvingina, at kunna taka skúlagongdina í donskum skúla eins og aðrir lærlingar, har skúlagongdin ikki fæst í Føroyum. Nevndin vísir eisini á, at skúlagongdin kann takast í Føroyum. Hesum mælir nevndin til - sí bls. 9.

*Lokin útbúgving skal kunna geva førleika til framhaldslestur.*
Nevndin hevur kannað, hvørjar treytirnar eru fyri upptøku á framhaldsútbúgvingum og er komin til ta niðurstøðu, at avlærdir byggismiðir lúka upptøkutreytirnar til framhaldandi útbúgving til eitt nú bygningskonstruktør. Førleikin er tó í ein mun treytaður av, at lærlingarnar hava lokið tær í tilmælinum nevndu almennu lærugreinirnar - møguliga á einum C-stigi.

*At útbúgvingin, um hon skal samanberast við eina miðnámsútbúgving, í minsta lagi er 3 ár.*
Fyribilsnevndin mælir til, at útbúgving varir 3 ár og 9 mánaðir, og at hon bæði inniheldur tær í tilmælinum nevndu fakligu lærugreinir, her í millum sergreinir, umframt tær í tilmælinum nevndu almennu lærugreinirnar.

Í arbeiðssetninginum verður fyribilsnevndin við støði í nevndu ásetingum og málsetningum, biðin um geva ráðnum sína tilráðing um byggismiðútbúgvingina, soleiðis

- *at lærlingurin røkkur tey fakligu málini.* Fyribilsnevndin er av teirri sannføring, at um útbúgvingin verður skipað, soleiðis sum mælt er til í tilmælinum, verða tey fakligu málini rokkin. Her skal viðmerkjast, at tað er uppgávan hjá yrkisnevndini at tryggja hesum.

- *at lærlingurin røkkur tey almennu málini, tey persónligu málini og fær møguleika fyri framhaldandi útbúgving.* Fyribilsnevndin mælir til, at útbúgvingin verður soleiðis skipað, at lærlingar í byggismiðútbúgvingini lúka tey fakligu krøvini, umframt tey neyðugu almennu lærugreinakrøvini, sum m.a. skulu geva avlærdum førleika at verða tikin upp til framhaldandi útbúgving.

Fyribilsnevndin er av teirri meting, at hon sostatt í hesi tilráðing hevur lýst tey viðurskifti, sum henni varð álagt. Eisini metir fyribilsnevndin, at karmarnir um yrkisútbúgvingina *byggismiður*, soleiðis sum teir er lýstir, lúka tey krøv, sum sett eiga at verða slíkari útbúgving. Harumframt metir nevndin tilráðingina at verða nøktandi sum grundarlag fyri einari støðutakan hjá Yrkisútbúgvingarráðnum til, um tað skal mæla landsstýrismanninum til at seta útbúgviongina í verk, umframt nøktandi tilfar hjá møguligari viðkomandi yrkisnevnd at byggja víðari á.

*Tórshavn í juni mánaði 2003*

_______________________ _______________________
*Jan E. Andersen* *Poul Øregaard*

_______________________ _______________________
*Eyðfinn Lenvig* *Christina Nolsøe*

_______________________
*Petur Oluf Hansen, skrivari*

## Fylgiskjal 1

Niðanfyri er prentað skjal frá heimasíðuni hjá danska kenslumálaráðnum um yrkisútbúgvingina "struktør og brolægger", sum fyribilsnevndin hevur givið heitið "byggismiður" í tí føroysku yrkisútbúgvingini.

Hvis man vil samle den ældste erfaring og den nyeste viden om fundamenter, jordarbejder og vejbygning, så kan man samle struktør- og brolæggeruddannelsen under en hat - og det har man gjort. Uddannelsen har 3 specialer: brolægger, anlægsstruktør og bygningsstruktør. Brolæggerhvervet er i dag et meget lille erhverv, hvor der kun uddannes ganske få årligt, men det er et erhverv med stolte traditioner. Mange steder i Europa kan man endnu se romernes godt totusind år gamle efterladenskaber i form af brolagte veje. For brolægning er netop beregnet på at holde - år ud og år ind. Brolæggeren arbejder med brosten og kantsten i granit, fliser i cement og klinker af brændt ler. Det er typisk, når der skal særlig belægning på veje, fortove, torvepladser eller andre åbne pladser, at man tilkalder brolæggeren. Brolæggeren arbejder ofte tæt sammen med et par hjælpere. De langer stenene hen til brolæggeren, som med kunstnerisk indsigt og sans for form, farve og linier lægger sten og fliser i indviklede mønstre. Struktøruddannelsen er en nyere uddannelse, som både findes som en traditionel lærlingeuddannelse og i en speciel kort variant for voksenlærlinge. Her kan de ufaglærte folk fra erhvervet få ny indsigt, papir på deres viden og mod på nye opgaver og nye udfordringer. Anlægsstruktøren deltager bl.a. ved udgravninger og små og større jordarbejder. Det kan være udgravninger med rendegraver til bygningsfundamenter, etablering af kloak- og vandledninger eller nedgravning af elkabler i et område, der skal byggemodnes. Når der skal graves vejunderføringer eller bygges vejdæmninger og broer, er anlægsstruktøren med til at fundere i form af dræn og afvanding og påføring af skærver, stabilgrus, grus og sand, eller hvad opgaven nu kræver. Og så er struktøren jo eksperten i støbning med beton. Fundamenter, kældergulve, lysskakter eller opkørsler fra parkeringskældre. Anlægsstruktøren ved, hvordan betonen skal behandles, så den ikke smuldrer eller revner, men kan holde upåklageligt i årevis. Bygningsstruktøren kender også til entreprenørarbejdet, men indsatsen er vægtet mere i den del af byggearbejdet, som er på eller over jorden. Selvfølgelig omfatter arbejdet også jordarbejde, dræn og støbning af fundamenter, men det er især de dele, som har med bygningerne at gøre, som bygningsstruktøren engageres til. Kældre, trapper, støttemure og bygningsmure er bygningsstruktørens gebet med brug af forskalning og armeringsjern. Og selvfølgelig vejbroer og viadukter, gangtunneller og motorveje. Som bygningsstruktør sætter man sig spor i landskabet og i bybilledet. Bygningsstruktørerne arbejder ofte sammen i sjak på de større opgaver med glidestøbning, jernbinding, vibratorbrug, og hvad der ellers skal til for at sikre betonen mod hulrum og revner. Grundforløbet omfatter områdefagene Byggeteknik 1, Kloakering 1, Vej, anlæg og belægning 1 samt Mindre entreprenørmaskiner. Undervisningen på hovedforløbet omfatter grundfagene Arbejdsmiljø, Informationsteknologi, Matematik, Stil, form og farve, Dansk, Fysik, Materialeforståelse samt Produktudvikling, produktion og service. Områdefagene er Afsætning og nivellering, Kloakering 2, Tegning samt Vej, anlæg og belægning 2. Derudover har struktørerne områdefagene Byggeteknik 2 samt Montage og tildannelse. Anlægsstruktørerne har det bundne specialefag Anlægsteknik. Bygningsstruktørerne har det bundne specialefag Bygningsteknik og brolæggerne har det bundne specialefag Brolægning. Alle specialer har valgfag og valgfri specialefag. Uddannelsen til brolægger, anlægsstruktør og bygningsstruktør varer 3 år og 6-11 måneder. Heraf er der 45 ugers skolegang for brolæggerne og 55 uger for struktørerne. Du kan videreuddanne dig til bygningskonstruktør samt for struktørerne også som kloakmester.